

SvF • Sunnudag 10. kl. 21.45

## Napoleon 1:4 – Fr. dramarøð frá 2002

Í oktober 1795 er Napoleon ein fátækur generalur uttan kommando, men í einum uppreistri móti tí fronsku stjórnini, Direktoratinum, vísir hann bæði ágrýtni og eirindaloysi. Hann fer undir fleiri herferðir í Italia, sum eydnast væl, og hann verður fólkahetja í Fraklandi

SvF • Sunnudag 10. kl. 20.00

## »Tveir tímar 1:3«

Vit hava øll eina søgu. Hyggja vit okkum um, finna vit smáar søgur, sum mynda lívið í býnum. Hvat takast fólk við ein vanligan mikudag í Klaksvík, í Fuglafirði ella á Tvøroyri? Í hesi fyrstu sendingini eru vit í Klaksvík ein mánamorgun í oktober. Her hitta vit m.a. gøtumannin Petur Fritz Hansen, sum gongur til uppvenjingar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Dr2 • Fríggjadag 8. kl. 22.20

## »Frances« - við Sam Shephard og J. Lange

Hesa vikuna eru fleiri filmar á skránni, og serliga í kvøld, har fýra filmsumtalur eru útvaldar! M.a. hesin stórfilmurin frá 1983. Jessica Lange fekk sítt gjøgnumbrot í hesum dramafilminum um ta nú legendarisku Hollywood-stjørnuna frá 1930unum, hin umstrídda Frances Farmer. Avrikið hjá Jessica Lange í hesum filmi førdi við sær eina røð av Oscar-innstillingum og eitt ótal av góðum ummælum.

# VARPIÐ

Sosialurin TV TELEVARPIÐ

**Fríggjadagur 1. februar 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**